LM-008/2021

# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 07.09.2021 |
| Mál nr.: | 21/01383 |
| Málsviðgjørt: | JAK |
| Ummælistíð: | 23.03-23.04.2021 |
| Eftirkannað: | 11.08.2021 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg
um
at keypa fastogn í Føroyum**

**§ 1.** Persónur, sum hevur fastan bústað í Føroyum ella áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, kann keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Felag ella annar løgfrøðiligur persónur, sum hevur sítt høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, kann á sama hátt keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

*Loyvisskipan*

**§ 2.** Persónur, sum ikki hevur fastan bústað í Føroyum, og sum ikki áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, kann bara keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum við loyvi frá landsstýrismanninum, sbr. tó §§ 3 og 4.
*Stk. 2.* Felag ella annar løgfrøðiligur persónur, sum ikki hevur sítt høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, kann bara keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum við loyvi frá landsstýrismanninum, sbr. tó §§ 3 og 4.
*Stk. 3.* Útlendskir myndugleikar kunnu bara keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum við loyvi frá landsstýrismanninum.
*Stk. 4.* Fyri at fylgja skyldum, sum Føroyar hava sambært sáttmála við onnur lond, kann landsstýrismaðurin áseta, at persónar, feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, hóast tey ikki lúka treytirnar í stk. 1 og 2, uttan loyvi frá landsstýrismanninum kunnu keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum.

**§ 3.** Loyvi sambært § 2 krevst ikki, um fastogn verður ognað við arvi, við at sita í óskiftum búgvi ella við býti av felagsogn. Sama er galdandi fyri gávur til skyld í stígandi ella fallandi linju.

*Umsókn um loyvi*

**§ 4.** Umsókn um loyvi skal latast landsstýrismanninum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at endalig avtala er gjørd um avhending av fastognini, um fastognin ikki frammanundan er yvirtikin av øðrum.

*Fastogn sum nýtsluveð*

**§ 5.** Persónur, felag ella annar løgfrøðiligur persónur, ið sambært § 2 ikki uttan loyvi kann keypa ella ogna sær fastogn, kann heldur ikki uttan loyvi frá landsstýrismanninum yvirtaka fastogn sum nýtsluveð í meira enn 6 mánaðir.

*Treytir og tíðaravmarking*

**§ 6.** Loyvini sambært §§ 2 og 5 kunnu verða treytað og tíðaravmarkað.

*Tinglýsing av ognarskifti*

**§ 7.** Tá ognarskifti verður fráboðað til tinglýsingar, skal persónur:
1) vátta við trú og heiður á ognarheimildarskjalinum, at hann hevur fastan bústað í Føroyum,
2) vátta við trú og heiður á ognarheimildarskjalinum, at hann áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár,
3) vátta við trú og heiður á ognarheimildarskjalinum, at fastognin er ognað sambært § 3, ella
4) leggja loyvi frá landsstýrismanninum við, sbr. tó stk. 3.

*Stk. 2.* Felag ella annar løgfrøðiligur persónur skal á sama hátt:
1) vátta við trú og heiður á ognarheimildarskjalinum, at høvuðssætið er í Føroyum,
2) vátta við trú og heiður á ognarheimildarskjalinum, at fastognin er ognað sambært § 3, ella
3) leggja loyvi frá landsstýrismanninum við, sbr. tó stk. 3.

*Stk. 3.* Verður ognarheimildarskjal fráboðað til tinglýsingar, uttan at persónur, felag ella annar løgfrøðiligur persónur samstundis váttar ella leggur við loyvi sambært stk. 1 ella 2, verður skjalið burturvíst uttan so, at viðkomandi váttar við trú og heiður, at umsóknin er latin landsstýrismanninum sambært § 4. Er umsóknin latin landsstýrismanninum sambært § 4, ásetir Tinglýsingin sambært §§ 15, stk. 3 og 16, stk. 3 í løgtingslóg um tinglýsing freist at leggja fram loyvið. Um loyvið ikki er Tinglýsingini í hendi, tá freistin er farin, verður skjalið strikað.

*Fráboðan til landsstýrismannin*

**§ 8.** Setur Tinglýsingin sambært § 7, stk. 3 freist at fáa loyvi frá landsstýrismanninum, gevur Tinglýsingin landsstýrismanninum boð um hetta.

*Stk. 2.* Verður fastogn yvirtikin sum nýtsluveð av persóni, sum ikki hevur bústað í Føroyum, ella av felagi ella øðrum løgfrøðiligum persóni, fevndur av § 2, stk. 2, gevur dómarin landsstýrismanninum boð um hetta.

*Boð um at selja*

**§ 9.** Um loyvi verður noktað ella fellur burtur sambært § 6, ella um umsókn ikki verður latin inn, gevur landsstýrismaðurin eigaranum boð um at selja fastognina innan eina nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og í mesta lagi 1 ár.

*Stk. 2.* Er fastognin yvirtikin sum nýtsluveð fær veðhavari í førum, sum eru nevnd í stk. 1, boð um innan eina nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og í mesta lagi 1 ár, at selja fastognina á tvingsilssølu ella at víkja frá veðnum.

*Uttanumvik*

**§ 10.** Avtalur um drúgt brúksmál ella leigumál av fastogn, hvørs endamál er uttanumvik av reglunum í hesi løgtingslóg, eru ógildigar.

*Stk. 2.* Fyri aðrar rættargerðir, hvørs endamál er uttanumvik av reglunum í hesi løgtingslóg, eru §§ 4-9 at nýta samsvarandi.

*Heimiling, gjald o.a.*

**§ 11.** Landsstýrismaðurin kann leggja sínar heimildir sambært § 2, stk. 1-3, § 5 og § 9, stk. 1 og 2 til ein annan myndugleika ella stovn. Verða heimildirnar lagdar til myndugleika ella stovn undir málsræði hjá øðrum landsstýrismanni, verður hetta gjørt í samráð við avvarðandi landsstýrismann.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um gjald fyri umsókn um loyvi at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn.
*Stk. 3.* Ger landsstýrismaðurin av at leggja heimildir sínar sambært hesi løgtingslóg til eina annan myndugleika ella stovn, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um kærur um avgerðir, tiknar av hesum myndugleika ella stovni, undir hesum áseta kærufreist, og avgera, at ávíst slag av avgerðum ikki kann kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann eisini leggja sín kærumyndugleika til kærustovn, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina.

*Revsing*

**§ 12.** Persónur, sum ikki innan ásettu freistina søkir um loyvi at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum ella til yvirtøku av fastogn sum nýtsluveð, verður revsaður við sekt.
*Stk. 2.* Brot á boð, sum eru givin sambært § 9, stk. 1 og 2, verða revsað við sekt. Rætturin áleggur eigaranum ella tí, sum hevur yvirtikið fastognina sum nýtsluveð, at gera eftir boðunum og kann áseta vikuligar tvingsilssektir, til boðini eru fylgd. Rætturin ásetir sektarupphæddina.
*Stk. 3.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Gildiskoma og skiftisregla*

**§ 13.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Løgtingslógin er galdandi fyri keyp o.a., ið verður fráboðað til tinglýsingar eftir gildiskomuna.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Seinasta áratíggju hevur føroyska ferðavinnan verið í sterkari menning. Ferðafólkatalið er fleirfaldað, matstovu- og gistingarhúsvirksemið lyft á altjóða stig, og Føroyar eru vorðnar eitt altjóða ferðamál.

Ein avleiðing av hesi gongd er, at umheimurin hevur fingið eyguni upp fyri Føroyum. Hetta hevur sjálvsagt fyrimunir við sær fyri føroyska samfelagið, men eisini avbjóðingar og vansar av ymsum slagi.

Seinastu árini hevur kjak tikið seg upp um, hvørt tað er rætt, at útlendingar hava sama rætt sum føroyingar at ogna sær fastogn í Føroyum, tí ábendingar eru um, at áhugin fyri føroyskari fastogn er vaksandi í útlandinum.

Tó at hetta ikki enn sæst týðiliga aftur í talinum av fastognum, ið verða seldar útlendingum, kann støðan skjótt broytast. Avmarkaða lendið í Føroyum hevur samstundis við sær, at fylgjurnar skjótt kunnu gerast rættiliga álvarsamar, um útlendingar byrja at leggja undir seg stór jarðarøki ella bústaðir í hópatali.

Heldur enn at bíða eftir møguligum trupulleikum hevur landsstýrið tískil valt at byrgja fyri møguleikan hjá útlendingum, sum ikki hava nakað tilknýti til Føroyar, at leggja føroyska fastogn undir seg.

Lógaruppskotið leggur upp til eina loyvisskipan, har útlendingar, sum ikki búgva í Føroyum, og sum ikki áður hava búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, og útlendskar fyritøkur, sum ikki hava sítt høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, bara kunnu keypa fastogn í Føroyum við loyvi frá landsstýrinum.

Endamálið er at tryggja, at persónar og fyritøkur, sum eiga fastogn í Føroyum, hava persónligt ella vinnuligt tilknýti til landið.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Tað eru í løtuni ongar reglur, sum avmarka atgongdina, ella gera tað møguligt at avmarka atgongdina, til føroyska fastognarmarknaðin. Tískil stendur tað øllum frítt, uttan mun til tjóðskap ella bústað, at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum.

Fastogn skal í hesum sambandi skiljast í breiðastu merking sum hús, íbúðir, grundstykki, jørð o.s.fr.

*1.2.1. Lóggáva í øðrum londum*

Í sambandi við fyrireikingina av lógaruppskotinum hevur Løgmansskrivstovan kannað, hvørjar reglur eru á hesum øki í londunum kring um okkum.

*Danmark*

Eftir reglunum í Danmark (lov om erhvervelse af fast ejendom) er høvuðsreglan, at persónar, sum ikki hava bústað í Danmark, og sum heldur ikki hava havt bústað í landinum í eitt tíðarskeið upp á tilsamans 5 ár, skulu hava loyvi frá løgmálaráðharranum fyri at ogna sær

fastogn í Danmark. Tað sama er galdandi fyri vinnufeløg og onnur feløg, almennar ella privatar stovnar o.a.

Bústaður – ella heimstaður fyri feløg o.a. – í Føroyum ella Grønlandi verður javnsettur við bústað ella heimstað í Danmark. Føroyingar og føroysk feløg o.a. kunnu tí keypa fastogn (heilársbústað og summarhús) í Danmark uttan loyvi.

Danmarkar limaskapur í ES hevur við sær skyldur at seta reglur í verk, sum víkja frá krøvum um heimarætt (indfødsret), bústað og heimstað í tann mun tað er neyðugt fyri at uppfylla ES-reglur um niðurseturætt, tænastuveitingar um landamørk og frælsi hjá arbeiðsmegini at flyta um landamørk

Fyri persónar, sum ikki hava bústað í Danmark, men sum eru ríkisborgarar í einum ES- ella EBS-landi, eru tí ásettar reglur, sum víkja frá kravinum um loyvi at keypa. Reglurnar eru galdandi fyri arbeiðstakarar, sum eru ríkisborgarar í einum ES- ella EBS-landi, og sum eru løntakarar í Danmark. Tær galda eisini fyri ríkisborgarar í einum ES- ella EBS landi, sum hava ella ætla at seta seg niður í Danmark sum sjálvstøðugt vinnurekandi ella sum hava ella ætla at stovna agentur ella deild í Danmark. Harumframt galda undantaksreglurnar fyri vinnufeløg o.a., sum eru stovnað samsvarandi lóggávuni í einum ES- ella EB landi, og sum hava ella ætla at stovna deildir ella agentur ella at veita tænastur í Danamark.

ES-reglur hava harumframt við sær, at donsk lóggáva loyvir lesandi, pensjonistum og øðrum persónum, sum eru førir fyri at forsyrgja sær sjálvum, møguleika í ávísum førum at keypa fastogn í Danmark uttan loyvi.

Tað er ein fyritreyt fyri at vera fevndur av nevndu undantøkum sambært ES-rættinum, at talan er um at keypa ogn, sum skal verða heilársbústaður. Fyri feløg skal fastognin verða ein fyritreyt fyri sjálvstøðuga vinnuvirkseminum. Hetta hevur við sær, at persónar, sum eru ríkisborgarar í einum ES ella EBS-landi, sum ikki hava bústað í Danmark, og sum heldur ikki hava havt bústað í Danmark í eitt tíðarskeið upp á tilsamans 5 ár, framhaldandi skulu hava lovyi at keypa fastogn í Danmark um talan er um keyp av summarhúsi.

Loyvi verður givið eftir eini ítøkligari meting. Av viðmerkingunum til lógina framgongur, at lógin skal verða umsitin lutfalsliga liberalt, serliga mótvegis borgarum, sum hava eitthvørt tilknýti til Danmark.

Tá talan hevur verið um útlendskar fyritøkur, ið vilja keypa fastogn í Danmark til gera framleiðslubygningar o.l., hevur loyvi vanliga verið givið.

*Ísland*
Sambært íslendskari lóggávu kunnu íslendskir ríkisborgarar og fremmandir ríkisborgarar, sum hava bústað í Íslandi, keypa fastogn í Íslandi.

Fremmandir ríkisborgarar, sum ikki hava bústað í Íslandi, skulu søkja loyvi fyri at keypa fastogn í Íslandi. Hesir ríkisborgarar kunnu fáa loyvi at keypa fastogn, um keypið er partur av vinnuligum virksemi, sum viðkomandi hevur rætt til at hava í Íslandi, ella um tað eftir eina ítøkiliga meting verður mett, at keypið kann fara fram. Í hesi meting verður m.a. dentur lagdur á, hvat fastognin skal brúkast til, fyrimunirnar fyri búskapin, ávirkanina á umhvørvið o.s.fr.

Hóast hetta útgangsstøðið kunnu ES- og EBS-borgarar og føroyingar undir ávísum treytum keypa fastogn í Íslandi uttan serligt loyvi.

*Norra*
Norsk lóggáva hevur ikki serligar ásetingar um møguleikan hjá útlendskum ríkisborgarum ella persónum við bústaði uttanfyri Norra at keypa fastogn í Norra. Tó eru reglur um bústaðarskyldu, sum upprunaliga hava havt til endamáls at tryggja bústað og røkt í landbúnaðarøkjum. Eisini eru kommunalar ásetingar um bústaðarskyldu, sum serliga hava til endamáls at tryggja, at heilársbústaðir ikki verða brúktir sum summarhús. Møguleiki er at søkja um undantak frá kravinum um bústaðarskyldu.

Eftir ítøkiliga meting kann loyvi verða givið til keyp av fastogn uttan bústaðarskyldu, um kravið ikki verður mett neyðugt fyri at fyribyrgja, at bústaðurin verður nýttur sum summarhús.

*Áland*
Í Álandi eru reglur, sum hava til endamáls at tryggja, at persónar, sum hava bústað í Álandi, eiga føstu ognirnar. Persónar, sum hava álendskan heimarætt og bústað í Álandi kunnu keypa fastogn uttan loyvi. Tað er ein fortreyt fyri at fáa álendskan heimarætt, at viðkomandi frammanundan er finskur ríkisborgari og hevur bústað í Álandi.

Loyvi kann verða givið øðrum eftir umsókn grundað á tilknýti til Áland, undir hesum um viðkomandi hevur búð í Álandi longur enn fimm ár. Hóast útgangsstøðið er ynski um at tryggja, at persónar við bústaði í Álandi keypa ognir, er tað møguligt hjá persónum, sum ikki eru búsitandi í Álandi, og sum tí hava mist sín álendska heimarætt, at keypa summarhús. Í hesum førum eru tó krøv um stødd av húsinum og staðseting.

*Onnur lond*
Svøríki, Týskland og Frankaríki hava at síggja til ikki reglur, sum áseta avmarkingar í ella treytir fyri, nær útlendingar kunnu keypa fastogn.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja, at persónar og fyritøkur, sum eiga fastogn í Føroyum, hava persónligt ella vinnuligt tilknýti til landið.

Við lógaruppskotinum verður tað møguligt at hava eftirlit við keypi av fastogn, har keypari ikki hevur bústað í Føroyum ella í øðrum parti av ríkinum, ella har keypari er felag ella annar løgfrøðiligur persónur, sum ikki hevur høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum. Lógaruppskotið tryggjar, at tann, sum eigur fastogn í Føroyum, annaðhvørt býr ella hevur tilknýti til Føroyar ella annan part av ríkinum, og at talið á útlendingum, sum eiga fastogn í Føroyum ella í ávísum økjum í Føroyum, ikki verður ov høgt.

Lógaruppskotið bannar ikki ávísum persónum ella feløgum at keypa fastogn í Føroyum. Ein forboðsskipan verður mett sum eitt óneyðuga stórt stig at taka í løtuni.

Við lógaruppskotinum hevur landsstýrið lagt seg eftir at finna eina javnvág soleiðis, at møguleikin hjá útlendingum fyri at keypa fastogn í Føroyum verður stýrdur, samstundis sum tað ikki verða settar óneyðugar forðingar fyri útlendingum og útlendskum vinnuvirksemi í Føroyum, ið er føroyska samfelagnum at gagni.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

*1.4.1. Loyvisskipan*

Lógaruppskotið ásetir eina loyvisskipan, har persónar, sum ikki hava fastan bústað í Føroyum, og sum heldur ikki hava búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, skulu hava loyvi frá landsstýrismanninum fyri at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum.

Ein loyvisskipan verður eisini galdandi fyri feløg og aðrar løgfrøðiligar persónar, sí niðanfyri undir pkt. 1.4.3.

Talan er ikki um eina forboðsskipan. Heldur verður skilt ímillum persónar og fyritøkur, sum mugu fáa loyvi at keypa, og tey, sum kunnu keypa uttan loyvi.

Orsøkin til, at tað verður lagt upp til eina loyvisskipan heldur enn eina forboðsskipan, er, at ein forboðsskipan ikki stendur í mát við støðuna í Føroyum, har tað í dag ikki er ein útbreiddur trupulleiki, at útlendingar, sum ikki hava tilknýti til Føroyar, leggja fastogn undir seg.

Sambært lógaruppskotinum kunnu øll tey, ið hava fastan bústað í Føroyum, uttan mun til tjóðskap, keypa fastogn uttan loyvi. At seta krav um, at hesi skulu søkja um loyvi, er høpisleyst og óneyðuga tyngjandi fyri borgarar og fyrisiting.

At bústaðurin er fastur merkir, at talan er um varandi bústað í Føroyum. Tá ognarheimildarskjal verður latið til tinglýsingar, skal keypari vátta við trú og heiður, at hann hevur fastan bústað í Føroyum.

Sambært skipanini kunnu persónar, sum í løtuni ikki búgva í Føroyum, men sum áður hava búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, eisini keypa fastogn uttan loyvi. Talan noyðist ikki at vera um eitt samanhangandi tíðarskeið, og tískil kunnu fleiri styttri tíðarskeið teljast saman. Bústaðurin skal tó hava verið fastur og varandi hesi tíðarskeið, og tí telja feriur o.a. ikki við. Tá ognarheimildarskjal verður latið til tinglýsingar, skal keypari vátta við trú og heiður, at hann hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár.

Sambært § 161 í revsilógini (lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 22. apríl 2021) verður tann revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár, sum gevur almennum myndugleika falska váttan við trú og heiður. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Letur keypari Tinglýsingini falska váttan við trú og heiður, er talan harafturat um eina rættargerð, ið hevur sum endamál at umganga reglurnar í hesi løgtingslóg, sbr. uppskotið til § 10, stk. 2. Landsstýrismaðurin kann tá geva eigaranum boð um at avhenda ognina innan eina nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og í mesta lagi 1 ár, sbr. uppskotið til § 9, stk. 1. Rætturin kann í hesum sambandi áleggja keypara tvingsilssektir, til boðini eru fylgd.

*1.4.2. At geva loyvi*

Lógaruppskotið leggur upp til eina loyvisskipan, har persónar, sum ikki hava fastan bústað í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, og sum heldur ikki áður hava búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, skulu søkja landsstýrismannin um loyvi at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum.

Tað er ein ítøkilig fyrisitingarlig avgerð, um loyvi skal gevast, og tað er ikki ásett nærri í lógartekstinum, hvørji atlit ein møgulig avgerð kann grundast á. Tó skal tað við avgerðini altíð takast atlit at endamálinum við løgtingslógini, sum er at tryggja, at tann, sum eigur fastogn í Føroyum, hevur ávíst tilknýti til Føroyar, og at lutfallið av útlendingum, sum eiga fastogn í ávísum økjum í Føroyum, ikki verður ov høgt.

Harafturat hevur tað týdning fyri metingina, um fastognin er ætlað sum fastur bústaður ella sum frítíðarbústaður (summarhús). Er fastognin ætlað sum fastur (og varandi) bústaður í Føroyum, verður loyvi sum meginregla givið, tí løgtingslógin skal ikki seta forðingar fyri ella á annan hátt stýra tilflyting til Føroyar. Skal ognin brúkast sum summarhús, kann tað takast við í metingina, um viðkomandi áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í styttri ella longurvarandi tíðarskeið (tó undir 5 ár).

Í avgerðini kann dentur eisini leggjast á, um viðkomandi á annan hátt hevur serligt tilknýti til Føroyar, hevur familju í Føroyum, tilknýti til føroyska arbeiðsmarknaðin ella hevur serligan kunnleika til Føroyar, undir hesum kunnleika til føroyska málið ella mentan og søgu Føroya.

Umframt at meta um tilknýti hjá umsøkjarum til Føroyar kann talið á útlendingum, sum eiga fastogn í einum øki, eisini takast við í metingina. Eitt av endamálunum við uppskotinum er nevniliga at fyribyrgja, at ávís økir ella ávísar bygdir í stóran mun verða til summarhúsøki hjá útlendingum. Politiskt verður tað mett umráðandi at varðveita ein virknan og livandi útjaðara, tí lítil ivi er um, at hetta hevur við sær betri umstøður hjá teimum fastbúgvandi.

Leggjast kann afturat, at tilknýti til Føroyar kann koma til sjóndar á sera ymiskan hátt frá máli til mál, og at tað ikki er skynsamt at lýsa hetta út í æsir í uppskotinum, tí hetta kann hava við sær ótilætlaðar avmarkingar. Avgerandi er tó, at talan er um veruligt tilknýti við einari ávísari tyngd. Yvirskipaður kunnleiki til føroyska málið, mentan og søgu Føroya, vil tí ikki í sær sjálvum vera nøktandi.

Ætlanin er ikki, at skipanin skal umsitast avmarkandi. Hetta er serliga galdandi, tá ið fastognin er ætlað sum heilársbústaður. Er fastognin ætlað sum frítíðarbústaður, og útlendingurin hevur skjalprógvað sítt tilknýti til Føroyar, verður loyvi sum meginregla eisini givið. Tó kann talið á útlendingum, sum eiga summarhús í økinum, tala ímóti hesum.

Sum liður í metingini av, um lutfallið av útlendingum, sum eiga fastogn í einum øki, er ov stórt, kann Løgmansskrivstovan/loyvismyndugleikin biðja um ummæli frá viðkomandi kommunu. Á henda hátt fáa kommunurnar møguleika at gera sína ávirkan galdandi.

Samanumtikið kann skipanin í stuttum lýsast soleiðis, at um ein útlendingur ynskir at keypa fastogn í Føroyum, og fastognin er ætlað sum fastur bústaður, verður loyvi sum meginregla givið. Ætlar útlendingurin hinvegin at nýta ognina sum summarhús, verður loyvi sum meginregla ikki givið, um viðkomandi ikki onkursvegna skjalprógvar serligt tilknýti til Føroyar.

*1.4.3. Løgfrøðiligir persónar*

Við lógaruppskotinum verður ein loyvisskipan eisini galdandi fyri feløg og aðrar løgfrøðiligar persónar.

Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum ikki hava sítt høvuðssæti í Føroyum, kunnu tískil bara keypa fastogn í Føroyum við loyvi frá landsstýrismanninum.

Ymisk viðurskifti kunnu hava ávirkan á, nær eitt felag verður mett at hava høvuðssæti í Føroyum. Avgerandi er tó, at felagið verður stýrt úr Føroyum. Verður felagið stýrt gjøgnum leiðsluna, skal leiðslan sostatt hava sæti í Føroyum. Verður felagið hinvegin stýrt gjøgnum nevndina, skal nevndin/nevndarformaðurin hava sæti/bústað í Føroyum.

Fyri smærri fyritøkur er avgerandi, hvar eigarin ella eigararnir av fyritøkuni hava sín bústað.

Metingin av, um eitt felag, sum ikki hevur høvuðssæti í Føroyum, skal fáa loyvi at keypa fastogn í Føroyum, skal fyrst og fremst grundast á, um fastognin er ein fyritreyt fyri vinnuliga virkseminum í Føroyum. Í hesum sambandi verður hugt at, hvat endamálið hjá felagnum er, hvat slag av virksemi felagið hevur í heimlandinum, og um virksemið, felagið ætlar sær at útinna í Føroyum, samsvarar við virksemi og endamál felagsins í heimlandinum.

Ynskir ein útlendsk fyritøka at keypa ein virkisbygning í Føroyum til nýtslu í síni framleiðslu, verður loyvi sum meginregla givið.

Um eitt felag rekur t.d. gistingarhúsvirksemi í landinum, har felagið er skrásett, og felagið ætlar at keypa fastogn í Føroyum við tí endamáli at reka gistingarhúsvirksemi her í landinum, verður loyvi sum meginregla givið. Fyrisitingin skal sostatt ikki meta um, hvørt tað er lønandi ella skynsamt at reka slíkt virksemi í Føroyum, tí ætlanin er ikki at forða fyri útlendskum vinnuvirksemi í Føroyum.

Tað kunnu vera aðrar reglur, eitt nú vinnulóggáva, fiskivinnulóggáva og byggilóggáva, ið seta treytir til vinnuligt virksemi í Føroyum, og sum tískil kunnu hava ávirkan á, um ein fyritøka fær loyvi ella ikki.

Eins og fyri likamligar persónar kann talið á útlendingum, sum eiga fastogn í økinum, harafturat takast við í metingina.

*1.4.4. Heimastýrislógin og skyldur sambært sáttmálum*

Sambært § 10, stk. 2, 2. pkt. í heimastýrislógini kann tað í lóggávu og umsiting ikki verða gjørdur munur á føroyingum og øðrum donskum ríkisborgarum.

Føroyingur er í hesum sambandi at skilja sum danskur ríkisborgari, heimahoyrandi í Føroyum.

§ 10, stk. 2, 2. pkt. í heimastýrislógini forðar ikki fyri, at tað í løgtingslóg verður sett sum krav, at persónur, fyri at fáa onkran ávísan ágóða, hevur bústað í Føroyum. Grundin til hetta er, at tað stendur øllum ríkisborgarum frítt at búseta seg í Føroyum, sí í hesum sambandi dóm frá Eystara Landsrætti U1983.986Ø um tulkingina av § 10, stk. 2, 2. pkt. í heimastýrislógini.

Ein treyt um at hava búð í Føroyum í samanlagt 5 ár skilir ikki millum persónar grundað á ríkisborgararætt. Treytin er tó munandi lættari hjá føroyingum at lúka enn hjá øðrum donskum ríkisborgarum, og tað er tí ivasamt, um eitt tílíkt krav kann rúmast innan karmarnar av § 10, stk. 2, 2. pkt. í heimastýrislógini.

Fyri at tryggja, at lógaruppskotið er í samsvari við § 10, stk. 2, 2. pkt. í heimastýrislógini, verður tí ásett, at bústaður í øðrum parti av ríkinum verður taldur við í kravið um bústað í Føroyum í samanlagt 5 ár.

Tað sama ger seg galdandi fyri feløg og aðrar løgfrøðiligar persónar. Feløg, ið hava høvuðssæti í øðrum parti av ríkinum, hava tí eisini rætt at keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Sum nevnt í almennu viðmerkingunum omanfyri í pkt. 1.2.1. um galdandi reglur í Danmark verður bústaður í Føroyum ella Grønlandi javnsettur við bústað ella heimstað í Danmark. Tað sama er galdandi fyri heimstað hjá feløgum og øðrum løgfrøðiligum persónum. Føroyingar kunnu tí keypa fastogn í Danmark á jøvnum føti við danir.

Skipanin, sum lógaruppskotið leggur upp til, tryggjar sostatt eins sínámillum atgongd fyri ríkisborgarar og fyritøkur í ríkinum.

Tað kunnu harafturat vera skyldur í sáttmálum, Føroyar gera við onnur lond, ið hava við sær, at Føroyar ikki kunnu áseta aðrar treytir fyri útlendingar enn fyri føroyingar. Tí kann landsstýrismaðurin við lógaruppskotinum áseta reglur um, at ávísir persónar og feløg ikki skulu søkja um loyvi, hóast vanligu treytirnar fyri at keypa fastogn ikki eru loknar.

Í løtuni er Hoyvíkssáttmálin einasti sáttmáli, ið hevur við sær slíkar skyldur fyri Føroyar. Sáttmálin tryggjar føroyingum møguleika at keypa fastogn í Íslandi á jøvnum føti við íslendingar.

*1.4.5. Váttan við trú og heiður ella loyvi*

Fyri at tryggja, at umsitingarligu byrðurnar hjá Tinglýsingini ikki verða ov tungar, hevur Løgmansskrivstovan valt ein leist, har tað ikki er Tinglýsingin, ið skal kanna, men keypari, ið skal vátta, at hann lýkur treytirnar fyri at keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Tá ognarskifti skal tinglýsast, skal keypari sostatt vátta við trú og heiður, at hann hevur fastan bústað í Føroyum ella áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár.

Sum nevnt verður bústaður í øðrum parti av ríkinum taldur við í bústaðakravið upp á 5 ár.

Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar skulu á sama hátt vátta við trú og heiður, at felagið hevur høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum.

Lýkur keypari ikki omannevndu treytir, er neyðugt við loyvi frá landsstýrismanninum.

Umsókn um loyvi at keypa fastogn í Føroyum verður viðgjørd av Løgmansskrivstovuni/ loyvismyndugleikanum. Tað er tí Løgmansskrivstovan/loyvismyndugleikin, ið tekur støðu til, um persónliga ella vinnuliga tilknýtið hjá keypara til Føroyar er av slíkum slag, at umsóknin skal gangast á møti. Víst verður í hesum sambandi til pkt. 1.4.2. og 1.4.3. omanfyri.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá:

- Stjórnarráðunum,
- Umhvørvisstovuni/Tinglýsingini,
- TAKS,
- Brúkaraumboðnum,
- Skráseting Føroya,
- Vinnuhúsinum,
- Føroya Rætti,
- Kommunufelagnum,
- Advokatfelag Føroya,
- Skyn,
- Betri Heim,
- Meklaranum,
- Útoyggjafelagnum,
- Bústøðum,
- BLF, og
- Dátueftirlitinum

Uppskotið hevur harafturat ligið til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.

Ummælisskjal er lagt við sum fylgiskjal 1.

### 1.6. Myndlýsing av lógaruppskotinum



**Einki loyvi krevst**

## Føroyingar

- og útlendingar, sum búgva í Føroyum ella hava búð í Føroyum í meira enn fimm ár, kunnu keypa fastogn í Føroyum eins og áður.



**Loyvi krevst**

## Útlendingar

- sum ætla at flyta til Føroya og útlendingar við tilknýti til Føroya fáa loyvi at keypa fastogn í Føroyum.




**Loyvi krevst**

## Útlendskar fyritøkur

- sum ætla at reka vinnuligt virksemi í Føroyum, kunnu fáa loyvi at keypa fastogn í Føroyum treytað av, at fastognin verður brúkt til vinnuligt virksemi.



**Loyvi ikki veitt**

## Útlendingar

- sum ætla at keypa fastogn til summarhús í Føroyum og einki tilknýti hava til Føroya, fáa ikki loyvi.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Av tí, at talið á útlendingum, sum keypa ella vilja keypa fastogn í Føroyum, eftir øllum at døma ikki er stórt í løtuni, verður mett, at uppskotið ikki hevur við sær fíggjarligar avleiðingar av týdningi fyri land ella kommunur.

Um so er, at áhugin millum útlendingar at keypa fastogn í Føroyum veksur og verður meira ítøkiligur, kunnu standast fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingarnar av skipanini, sum lógaruppskotið leggur upp til.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sambært lógaruppskotinum skal keypari vátta við trú og heiður, at hann lýkur treytirnar fyri at keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrinum. Henda váttan kann leggjast til grund av Tinglýsingini uttan nærri kanningar. Mett verður tí ikki, at uppskotið fer at hava við sær stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri Tinglýsingina.

Sambært lógaruppskotinum skal Løgmansskrivstovan/loyvismyndugleikin viðgera umsóknir um at keypa fastogn í Føroyum. Av tí, at talið á útlendingum, sum keypa ella vilja keypa fastogn í Føroyum, eftir øllum at døma ikki er stórt, verður uppskotið tó mett at hava avmarkaðar umsitingarligar avleiðingar við sær fyri landið.

Um so er, at áhugin millum útlendingar at keypa fastogn í Føroyum veksur og gerst meira ítøkiligur, kunnu umsitingarligu avleiðingarnar fyri landið gerast størri.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Fyri landsstýrið hevur tað stóran týdning, at ein løgtingslóg um at keypa fastogn ikki setir óneyðugar forðingar fyri vinnuligum virksemi í Føroyum. Við eini loyvisskipan, sum ikki verður umsitin avmarkandi, kann hetta mál røkkast.

Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum hava høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, fara framvegis at kunna keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrinum, eins og útlendskt felag sum meginregla vil fáa loyvi at keypa fastogn, um fastognin er ein fyritreyt fyri vinnuliga virkseminum í Føroyum. Mett verður tí ikki, at lógaruppskotið hevur serliga stórar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

## 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Tað eru ikki serligir millumtjóðasáttmálar á økinum.

## 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

### 1) Hoyvíkssáttmálin

Í lógaruppskotinum er lagt upp til, at landsstýrismaðurin fyri at fylgja skyldum, sum Føroyar hava sambært sáttmála við onnur lond, kann áseta nærri reglur um, at ávísir persónar og feløg, hóast tey ikki lúka vanligu treytirnar í § 2, stk. 1 og 2, kunnu keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Hoyvíkssáttmálin ásetir m.a., at tað innan fyri innihaldsvídd sáttmálans er bannað at gera mismun vegna tjóðskap ella virkisstað. At seta treytir, sum verða ásettar í lógaruppskotinum mótvegis íslendingum og íslendskum feløgum o.a., eru ikki í samsvari við Hoyvíkssáttmálan. Ætlanin er tí, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir, at hesi kunnu keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi, hóast treytirnar í løgtingslógini ikki eru loknar.

### 2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS

EMRS er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

### 3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek

Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

## 2.9. Markaforðingar

Endamálið við lógaruppskotinum er at hava eftirlit við og í ávísan mun avmarka atgongdina til føroyska fastognarmarknaðin. Lógaruppskotið elvir tí til eina markaforðing.

Við lógaruppskotinum hevur landsstýrið lagt seg eftir at finna eina javnvág soleiðis, at møguleikin hjá útlendingum at keypa fastogn í Føroyum verður stýrdur, samstundis sum tað ikki verða settar óneyðugar forðingar fyri útlendingum og útlendskum vinnuvirksemi í Føroyum, ið er føroyska samfelagnum at gagni.

## 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Brot á ávísar ásetingar hevur við sær revsing við sekt. Verða boð frá landsstýrismanninum ikki fylgd, kann rætturin harafturat áleggja tvingsilssektir.

Harafturat fær landsstýrismaðurin í § 9, stk. 1 og 2 heimild at geva boð um, at fastogn skal seljast innan eina nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og í mesta lagi 1 ár.

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

## 2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Sambært § 11, stk. 2, kann landsstýrismaðurin áseta gjald fyri umsókn um loyvi at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum. Verður gjald ásett, skal tað standa mát við útreiðslurnar, sum viðgerðin av umsóknum hevur við sær.

Harumframt eru vanligu reglurnar um tinglýsingargjald galdandi. Tinglýsingargjald er í dag 1 % av keypsprísinum (+ tinglýsingaravgjald, sum er 1000 kr.). Fyri veð er tinglýsingargjaldið 1 % av veðtryggjaðu upphæddini (+ tinglýsingaravgjald).

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Sum greitt frá omanfyri undir pkt. 1.4.1. verður við lógaruppskotinum lagt upp til eina loyvisskipan viðvíkjandi keypi av fastogn í Føroyum.

Persónar, sum ikki búgva í Føroyum, og sum ikki áður hava búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, mugu sostatt søkja landsstýrismannin um loyvi til at keypa fastogn í Føroyum. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum ikki hava høvuðssæti í Føroyum, mugu á sama hátt søkja landsstýrismannin um loyvi til at keypa fastogn í Føroyum.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Sambært § 2, stk. 4 kann landsstýrismaðurin, fyri at fylgja skyldum, sum Føroyar hava sambært sáttmála við onnur lond, áseta nærri reglur um, at ávísir persónar og feløg, hóast tey ikki lúka vanligu treytirnar í § 2, stk. 1 og 2, kunnu keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Sambært § 9, stk. 1 og 2 fær landsstýrismaðurin heimild at geva boð um, at fastogn skal avhendast, um loyvi verður noktað ella fellur burtur, ella um umsókn ikki verður latin inn.

Sambært § 11, stk. 1 kann landsstýrismaðurin leggja sínar heimildir sambært § 2, stk. 1 og 2, § 5 og § 9, stk. 1 og 2 til annan myndugleika ella stovn.

Sambært § 11, stk. 2 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um gjald fyri umsókn um loyvi at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum. Verður gjald ásett, skal tað standa í mát við virksemið og útreiðslurnar, sum viðgerðin av umsóknum hevur við sær.

Sambært § 11, stk. 3 kann landsstýrismaðurin, um hann leggur sínar heimildir til annan myndugleika ella stovn, áseta reglur um kærur um avgerðir, tiknar av hesum myndugleika, eitt nú um kærufreist ella tað, at ávíst slag av avgerðum ikki kann kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Sambært § 11, stk. 4 kann landsstýrismaðurin harafturat leggja sín kærumyndugleika til eina kærunevnd, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Stk. 1* ásetir, at persónar, sum hava fastan bústað í Føroyum ella áður hava búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, kunnu keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Hesir persónar eru tískil ikki fevndir av loyvisskipanini.

*Stk. 2* ásetir á sama hátt, at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum hava sítt høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, kunnu keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

**Til § 2**
§ 2 í lógaruppskotinum ásetir meginreglurnar fyri einari loyvisskipan viðvíkjandi keypi av føroyskari fastogn. Við støði í hugtøkum sum *fastur bústaður*, *tilknýti* og *høvuðssæti* verður skilt millum persónar og fyritøkur, sum frítt kunnu keypa fastogn í Føroyum, og persónar og fyritøkur, sum bara kunnu keypa fastogn við loyvi frá landsstýrismanninum.

*Likamligir persónar*
*Stk. 1* ásetir, at persónur, sum ikki hevur fastan bústað í Føroyum, og sum heldur ikki áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, bara kann keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum við loyvi frá landsstýrismanninum.

Hetta merkir í sær sjálvum, at persónur, sum annaðhvørt hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, kann keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Hugtakið *fastur bústaður* merkir, at talan skal vera um varandi bústað. Í hesum liggur einki krav um, at keypari hevur búð leingi í Føroyum. Bústaður í heilt stutt tíðarskeið kann tískil eftir umstøðunum koma undir fastan bústað, um tað verður mett, at bústaðurin er ætlaður sum varandi.

Persónur, sum ikki býr í Føroyum, men sum áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, kann eisini keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrismanninum. At keypari skal hava búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í *samanlagt* 5 ár hevur tann týdning, at talan ikki noyðist at vera um eitt samanhangandi tíðarskeið. Tískil kunnu fleiri styttri tíðarskeið teljast saman. Bústaðurin skal tó hava verið fastur hesi tíðarskeið, og tí kunnu feriur o.a. ikki teljast við.

Bústaðarkravið upp á 5 ár kann lúkast við bústaði í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum. Danskur ríkisborgari, sum ikki hevur búð í Føroyum, men sum hevur búð í Danmark ella Grønlandi í samanlagt 5 ár, kann tískil keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum. Endamálið við hesum er at tryggja samsvar við § 10, stk. 2, 2. pkt. í heimastýrislógini, sum ásetir, at tað í lóggávu og umsiting ikki kann verða gjørdur munur á føroyingum og øðrum donskum ríkisborgarum. Víst verður í hesum sambandi til pkt. 1.4.4. undir almennum viðmerkingum.

Grundin til, at tað í lógaruppskotinum verður víst til *á annan hátt* (enn við keypi) *ogna sær*, er, at løgtingslógin skal fevna um øll sløg av endaligari yvirtøku av fastogn, sbr. tó § 3. Hetta merkir hinvegin, at leiga og onnur avmarkað rættindi ikki eru fevnd av kravinum um loyvi frá landsstýrismanninum, sbr. tó § 5.

*Fastogn* skal skiljast breitt sum hús, íbúðir, lutaíbúðir, grundøkir, jørð o.s.fr.

Hevur persónur ikki fastan bústað í Føroyum, og hevur viðkomandi ikki áður búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, kann viðkomandi bara keypa fastogn í Føroyum við loyvi frá landsstýrismanninum.

Umsókn um loyvi/endaliga ognarheimild skal vera landsstýrismanninum í hendi í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at endaliga keypsavtalan er gjørd. Loyvi er sostatt ikki ein fyritreyt fyri, at keypsavtalan kann gerast, men um keypari eftirfylgjandi ikki fær loyvi frá landsstýrismanninum, kann landsstýrismaðurin geva viðkomandi boð um at selja fastognina innan eina nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og í mesta lagi 1 ár, sbr. uppskotið til § 4 og serligar viðmerkingar til greinina.

Tað er ein ítøkilig fyrisitingarlig avgerð, um loyvi skal gevast, og tað verður ikki ásett nærri í lógartekstinum, hvørji atlit ein møgulig avgerð kann grundast á. Tó skal tað við avgerðini altíð takast atlit at endamálinum við løgtingslógini, sum er at tryggja, at tann, sum eigur fastogn í Føroyum, hevur ávíst tilknýti til Føroyar, og at lutfallið av útlendingum, sum eiga fastogn í ávísum økjum í Føroyum, ikki verður ov høgt.

Harafturat hevur tað týdning fyri metingina, um fastognin er ætlað sum fastur bústaður ella sum frítíðarbústaður (summarhús). Er fastognin ætlað sum fastur (og varandi) bústaður í Føroyum, verður loyvi sum meginregla givið, tí løgtingslógin skal ikki seta forðingar fyri ella á annan hátt stýra tilflyting til Føroyar. Skal ognin brúkast sum summarhús, kann tað takast við í metingina, um viðkomandi áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í styttri ella longurvarandi tíðarskeið (tó styttri enn 5 ár).

Í avgerðini kann dentur eisini leggjast á, um viðkomandi á annan hátt hevur serligt tilknýti til Føroyar, hevur familju í Føroyum, tilknýti til føroyska arbeiðsmarknaðin ella hevur serligan kunnleika til Føroyar, undir hesum kunnleika til føroyska málið ella mentan og søgu Føroya.

Umframt at meta um tilknýti hjá umsøkjarum til Føroyar kann talið á útlendingum, sum eiga fastogn í einum øki, eisini takast við í metingina. Eitt av endamálunum við uppskotinum er nevniliga at fyribyrgja, at ávís økir ella ávísar bygdir í stóran mun verða til summarhúsøki hjá útlendingum. Politiskt verður tað mett umráðandi at varðveita ein virknan og livandi útjaðara, tí lítil ivi er um, at hetta hevur við sær betri umstøður hjá teimum fastbúgvandi.

Leggjast kann afturat, at tilknýti til Føroyar kann koma til sjóndar á sera ymiskan hátt frá máli til mál, og at tað ikki er skynsamt at lýsa hetta út í æsir í uppskotinum, tí tað kann hava við sær ótilætlaðar avmarkingar. Avgerandi er tó, at talan er um veruligt tilknýti við einari ávísari tyngd. Yvirskipaður kunnleiki til føroyska málið, mentan og søgu Føroya, vil tí ikki í sær sjálvum vera nøktandi.

Ætlanin er ikki, at skipanin skal umsitast avmarkandi. Hetta er serliga galdandi, tá ið fastognin er ætlað sum heilársbústaður. Er fastognin ætlað sum frítíðarbústaður, og útlendingurin hevur

skjalprógvað sítt tilknýti til Føroyar, verður loyvi sum meginregla eisini givið. Tó kann talið á útlendingum, sum eiga summarhús í økinum, tala ímóti hesum.

Sum liður í metingini av, um lutfallið av útlendingum, sum eiga fastogn í einum øki, er ov stórt, kann Løgmansskrivstovan/loyvismyndugleikin biðja um ummæli frá viðkomandi kommunu. Á henda hátt fáa kommunurnar møguleika at gera sína ávirkan galdandi.

Samanumtikið kann skipanin í stuttum lýsast soleiðis, at um ein útlendingur ynskir at keypa fastogn í Føroyum, og fastognin er ætlað sum fastur bústaður, verður loyvi sum meginregla givið. Ætlar útlendingurin hinvegin at nýta ognina sum summarhús, verður loyvi sum meginregla ikki givið, um viðkomandi ikki onkursvegna skjalprógvar serligt tilknýti til Føroyar.

*Løgfrøðiligir persónar*
*Stk. 2* ásetir, at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum ikki hava sítt høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, bara kunnu keypa fastogn í Føroyum við loyvi frá landsstýrismanninum.

Hetta merkir í sær sjálvum, at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum hava sítt høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, kunnu keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Endamálið við, at felagið eisini kann hava høvuðssæti í *øðrum parti av ríkinum,* er at tryggja samsvar við § 10, stk. 2, 2. pkt. í heimastýrislógini, sum ásetir, at tað í lóggávu og umsiting ikki kann verða gjørdur munur á føroyingum og øðrum donskum ríkisborgarum. Víst verður í hesum sambandi til pkt. 1.4.4. undir almennu viðmerkingunum.

Metast má ítøkiliga um, hvørt eitt felag hevur høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum. Avgerandi er, at felagið verður stýrt úr Føroyum ella øðrum parti av ríkinum. Verður felagið stýrt gjøgnum leiðsluna, skal leiðslan sostatt hava sæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum. Verður felagið hinvegin stýrt gjøgnum nevndina, skal nevndin/nevndarformaðurin hava sæti/bústað í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum. Fyri smærri fyritøkur er avgerandi, hvar eigarin ella eigararnir av fyritøkuni hava sín bústað.

Á sama hátt má metast ítøkiliga um, hvørt eitt felag, sum ikki hevur sítt høvuðssæti í Føroyum, kann fáa loyvi at keypa fastogn í Føroyum. Tað er tó ein treyt, at fastognin er ein fyritreyt fyri vinnuligum virksemi, sum fyritøkan ætlar sær at útinna í Føroyum. Hyggjast skal at, um samband er millum virksemið, fyritøkan útinnir í heimlandinum, og virksemið, fyritøkan ætlar sær at útinna í Føroyum.

Um eitt felag rekur t.d. gistingarhúsvirksemi í landinum, har felagið er skrásett, og felagið ætlar sær at keypa fastogn í Føroyum við tí endamáli at reka gistingarhúsvirksemi her í landinum, verður loyvi sum meginregla givið. Fyrisitingin skal sostatt ikki meta um, hvørt tað er lønandi fyri føroyska samfelagið, at útlendingar reka gistingarhúsvirksemi í Føroyum.

Á sama hátt verður loyvi sum meginregla givið, um ein útlendsk fyritøka ynskir at keypa ein virkisbygning í Føroyum til nýtslu í síni framleiðslu.

At virksemið er ein fyritreyt fyri vinnuligum virksemi, hevur hinvegin tann týdning, at tað ikki fer at bera til hjá útlendskum fyritøkum at keypa fastogn í Føroyum, um fastognin bara er ætlað sum frítíðarbústaður hjá starvsfólkunum hjá fyritøkuni.

Tað kunnu vera aðrar reglur, eitt nú vinnulóggáva, fiskivinnulóggáva og byggilóggáva, ið seta treytir til vinnuligt virksemi í Føroyum, og sum kunnu hava ávirkan á, um ein fyritøka fær loyvi ella ikki.

Eins og fyri likamligar persónar kann talið á útlendingum og útlendskum fyritøkum, sum eiga fastogn í økinum, harafturat takast við í metingina.

*Útlendskir myndugleikar*
Ásett verður í *stk. 3*, at útlendskir myndugleikar bara kunnu keypa fastogn við loyvi frá landsstýrismanninum. Fyri útlendskar myndugleikar er sostatt – uttan undantak – altíð neyðugt við loyvi frá landsstýrismanninum.

*Sáttmálar við onnur lond*
Ásett verður í *stk. 4*, at landsstýrismaðurin kann áseta, at persónar, feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, hóast tey ikki lúka treytirnar í stk. 1 og 2, kunnu keypa fastogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum – hetta fyri at fylgja skyldum sambært sáttmála, sum Føroyar hava sambært sáttmálum við onnur lond.

Í løtuni er Hoyvíkssáttmálin einasti sáttmáli, ið hevur við sær slíkar skyldur fyri Føroyar. Sáttmálin tryggjar føroyingum møguleika at keypa fastogn í Íslandi á jøvnum føti við íslendingar.

**Til § 3**
Sambært § 3, 1. pkt. krevst einki loyvi, um fastognin verður ognað við arvi, við at sita í óskiftum búgvi ella við býti av felagsogn. Sambært 2. pkt. er tað sama galdandi fyri gávur til skyld í stígandi ella fallandi linju.

Tað verður mett óneyðugt og hartil inntrívandi fyri tann einstaka, um endaligar yvirtøkur av hesum slagi skuldu verið fevndar av kravinum um loyvi. Harafturat vil arvur o.s.fr. ofta vera ein ábending um ávíst tilknýti til Føroyar.

*Arvur* sambært § 3 fevnir bæði um legalan og testeraðan arv.

Ognan av fastogn við arvaforskoti er ikki fevnd av § 3 og krevur tískil loyvi, um vanligu treytirnar sambært § 2 ikki eru loknar.

**Til § 4**
Sambært § 4 skal umsókn um endaliga ognarheimild/loyvi latast inn í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at endalig keypsavtala er gjørd. Hetta er tó ikki galdandi, um ognin áðrenn hetta er yvirtikin av øðrum.

Freistin verður roknað frá tí degi, endalig keypsavtala er undirskrivað.

At umsóknin skal latast inn í seinasta lagi 6 mánaðir eftir endaliga keypsavtalu, merkir í sær sjálvum, at loyvi frá landsstýrismanninum ikki er ein fyritreyt fyri keypsavtalu. Við keyp og

sølu av fastogn skal ofta berast skjótt at, og ein skipan, har loyvi skal fáast til vegar áðrenn keypsavtaluna, er ov stirvin. Tí er hesin leistur valdur.

Tá endalig keypsavtala er fingin í lag, er ognin at meta sum yvirtikin av øðrum.

Loyvi kann bara gevast til eina ávísa fastogn. Persónur ella fyritøka kann sostatt ikki fáa eitt alment loyvi til at keypa fastogn í Føroyum ella til at keypa fastogn í ávísum øki ella ávísari bygd í Føroyum.

Er loyvið ikki avgreitt, tá ið keypsavtalan verður gjørd, er møguligt at treyta keypsavtaluna við, at keypari seinni fær loyvi.

Verður umsóknin ikki latin inn áðrenn freistina, gevur landsstýrismaðurin keypara boð um at selja fastognina innan eina nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og í mesta lagi 1 ár, sbr. § 9 og serligar viðmerkingar til greinina.

Landsstýrismaðurin kann í serligum førum viðgera umsóknir, sum eru latnar inn ov seint.

**Til § 5**
Í § 5 verður ásett, at tann, sum ikki uttan loyvi kann keypa ella ogna sær fastogn í Føroyum, heldur ikki uttan loyvi frá landsstýrismanninum kann yvirtaka fastogn sum nýtsluveð í meira enn 6 mánaðir.

Yvirtøka sum nýtsluveð (brugelig pant) fer fram eftir reglunum í kapittul 67 í rættargangslógini fyri Føroyar, t.e. lov nr. 964 af 26. juni 2020 om Retsplejelov for Færøerne.

Mishald av skyldum, t.d. gjaldskyldu, er ein fyritreyt fyri, at fastogn kann yvirtakast sum nýtsluveð. Tað er fútarætturin, ið tekur avgerð um yvirtøku sum nýtsluveð.

Tað krevst ikki loyvi frá landsstýrismanninum at hava veð í eini fastogn, og veðhavari, sum ikki hevur bústað í Føroyum ella hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, kann á jøvnum føti við aðrar veðhavar gera síni rættindi galdandi. Við nýtsluveði fær veðhavari ræðisrætt yvir fastognini, og yvirtøka sum nýtsluveð kann tí verða nýtt sum uttanumvik av reglunum í hesi løgtingslóg.

At tað verður ásett ein freist upp á 6 mánaðir, umframt at landsstýrismaðurin sambært § 9, stk. 2 kann áseta eina freist millum 6 mánaðir og 1 ár at selja ognina, gevur veðhavara rímiliga tíð at realisera sítt krav.

**Til § 6**
§ 6 ásetir, at loyvini sambært §§ 2 og 5 í løgtingslógini kunnu verða treytað og tíðaravmarkað.

Landsstýrismaðurin kann eitt nú seta sum treyt, at fastognin verður nýtt til ávíst endamál, at felag, sum keypir fastogn, hevur ávíst endamál, ella at nýtsluveð verður tíðaravmarkað.

Landsstýrismaðurin ger í hvørjum einstøkum føri av, um loyvi skal vera treytað og/ella tíðaravmarkað.

**Til § 7**

§ 7 ásetir mannagongdina fyri tinglýsing av ognarskifti. Til tess at fyribyrgja, at umsitingarligu byrðurnar hjá Tinglýsingini verða ov tungar, hevur Løgmansskrivstovan valt ein leist, har tað ikki er Tinglýsingin, ið skal kanna, men keypari, ið skal vátta, at hann lýkur treytirnar fyri at keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Ásett verður í *stk. 1, nr. 1-4*, at persónur, tá ognarskifti verður fráboðað til tinglýsingar, annaðhvørt skal vátta við trú og heiður á ognarheimildarskjalinum, at viðkomandi lýkur eina av treytunum fyri at keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrismanninum, ella leggja loyvi frá landsstýrismanninum við.

*Ognarheimildarskjal* vil í flestu førum vera eitt skeyti, men kann eisini vera eitthvørt annað slag av skjali, ið flytur ognarrættin frá einum eigara til annan.

Um persónur váttar við trú og heiður á ognarheimildarskjalinum, at hann 1) hevur fastan bústað í Føroyum, 2) at hann áður hevur búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, ella 3) at fastognin er ognað sambært § 3, kann ognarskiftið sostatt tinglýsast uttan nærri kanningar.

Sambært § 161 í revsilógini (lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 22. apríl 2021) verður tann revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár, sum gevur almennum myndugleika falska váttan við trú og heiður.

Letur keypari Tinglýsingini falska váttan við trú og heiður, er talan harafturat um eina rættargerð, hvørs endamál er uttanumvik av reglunum í hesi løgtingslóg, sbr. uppskotið til § 10, stk. 2. Landsstýrismaðurin kann tá geva eigaranum boð um at avhenda ognina innan eina nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og í mesta lagi 1 ár, sbr. uppskotið til § 9, stk. 1.

Á sama hátt sum likamligir persónar skulu feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar sambært *stk. 2* vátta við trú og heiður, at felagið er skrásett og hevur høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum.

Persónur, sum ikki lýkur treytirnar fyri at keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrismanninum, skal sambært stk. 1, nr. 4 leggja loyvi við, tá ognarheimildarskjalið verður sent til tinglýsingar.

Ásett verður í *stk. 2, nr. 1-3*, at felag ella annar løgfrøðiligur persónur, tá ognarskifti verður fráboðað til tinglýsingar, annaðhvørt skal vátta við trú og heiður á ognarheimildarskjalinum, at felagið lýkur eina av treytunum fyri at keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrismanninum, ella leggja loyvi frá landsstýrismanninum við.

Um felag ella annar løgfrøðiligur persónur váttar við trú og heiður, at felagið hevur sítt høvuðssæti í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, ella at fastognin er ognað sambært § 3, kann ognarskifti eins og omanfyri tinglýsast uttan nærri kanningar.

Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini og kunnu tí, eins og likamligir persónar, verða revsað fyri at geva falska váttan við trú og heiður.

Felag ella annar løgfrøðiligur persónur, sum ikki lýkur treytirnar fyri at keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrismanninum, skal sambært stk. 2, nr. 3 leggja loyvi frá landsstýrismanninum við, tá ognarheimildarskjalið verður sent til tinglýsingar.

Um ognarheimildarskjal verður fráboðað til tinglýsingar, uttan at keypari samstundis váttar ella leggur við loyvi sambært stk. 1 ella 2, verður skjalið sambært *stk. 3, 1. pkt.* burturvíst av Tinglýsingini uttan so, at keypari váttar við trú og heiður, at umsóknin er latin landsstýrismanninum sambært § 4.

§ 4 í lógaruppskotinum ásetir, at umsóknin skal latast landsstýrismanninum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at endalig avtala er gjørd um avhending av fastognini, um fastognin ikki áðrenn hetta er seld øðrum.

Váttar keypari við trú og heiður, at umsókn er latin landsstýrismanninum rættstundis, setir Tinglýsingin sambært § 15, stk. 3 í tinglýsingarlógini, t.e. løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 70 frá 15. mai 2014, freist at leggja fram loyvi, sbr. stk. 3, 2. pkt. Skjalið verður tá fyribils innført í tingbókina við tilskilan av orðinum *fyribils*, sbr. § 16, stk. 3, 1. pkt. í tinglýsingarlógini. Endamálið við hesum er at tryggja, at keypari sum skjótast kann fáa ta rættarvernd, sum tinglýsing av ognarheimildarskjalinum hevur við sær.

Um loyvið ikki er Tinglýsingini í hendi, tá ásetta freistin er farin, verður fyribils innførda skjalið strikað úr tingbókini, sbr. § 16, stk. 3, 2. pkt. í tinglýsingarlógini og § 7, stk. 3, 3. pkt. í lógaruppskotinum.

**Til § 8**
Hevur tinglýsingin sett keypara freist sambært § 7, stk. 3, skal Tinglýsingin sambært *§ 8, stk. 1* geva landsstýrismanninum boð um hetta.

Endamálið við hesum er at geva landsstýrismanninum møguleika at skipa og raðfesta sítt arbeiði.

Sambært *stk. 2* skal dómarin á sama hátt geva landsstýrismanninum boð, um fastogn verður yvirtikin sum nýtsluveð av persóni, sum ikki hevur bústað í Føroyum, ella av felagi ella øðrum løgfrøðiligum persóni, fevndur av § 2, stk. 2. Dómarin skal ikki taka støðu til, um viðkomandi hevur búð í Føroyum í samanlagt 5 ár og tí lýkur treytirnar fyri at ogna sær fastogn uttan loyvi. Hesa metingina ger landsstýrismaðurin, tá ið fráboðanin er komin frá dómaranum.

**Til § 9**
Um persónur, løgfrøðiligur ella likamligur, hevur keypt ella á annan hátt ognað sær fastogn uttan at hava rætt til hetta sambært løgtingslógini, ásetir § 9, at ognarrætturin skal avbrótast.

Verður loyvi noktað, verður umsókn ikki latin inn, ella fellur loyvi burtur sambært § 6, gevur landsstýrismaðurin tískil sambært *stk. 1* eigaranum boð um at selja fastognina innan ein nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og í mesta lagi 1 ár.

Ásetingin er neyðug í teimum førum, har keypsavtalan ikki er treytað av, at loyvi seinni verður givið, og keypsavtalan tí ikki av sær sjálvum fellur burtur, tá loyvi verður noktað.

At fastognin skal *seljast* merkir eitt nú, at eigari ikki, heldur enn at selja fastognina, kann geva fastognina sum gávu til skyld í stígandi ella fallandi linju sambært § 3, 2. pkt.

Er fastognin yvirtikin sum nýtsluveð, og veðhavari ikki hevur fingið loyvi sambært § 5, gevur landsstýrismaðurin á sama hátt veðhavara boð um at selja fastognina innan eina nærri ásetta freist, sum er í minsta lagi 6 mánaðir og i mesta lagi 1 ár.

Mett verður, at veðhavari hevur rímiligan møguleika at realisera sítt krav innan hesa freist.

Aktar eigari ella veðhavari ikki boðini frá landsstýrismanninum um at selja ognina innan ásettu freistina, kann rætturin áleggja vikuligar tvingsilsbøtur, til boðini eru fylgd, sbr. serligar viðmerkingar til § 12, stk. 2.

**Til § 10**
*Stk. 1* ásetir, at avtalur um drúgt brúksmál ella leigumál av fastogn, hvørs endamál er uttanumvik av reglunum í hesi løgtingslóg, eru ógildigar.

Endamálið við ásetingini er at fyribyrgja, at persónar, feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum bara kunnu keypa fastogn við loyvi frá landsstýrinum (og sum møguliga ikki lúka treytirnar at fáa loyvi), fáa atgongd til føroyska fastogn uttan at søkja landsstýrið um loyvi.

Metast má ítøkiliga um, hvørt endamálið við einari avtalu er uttanumvik av reglunum í løgtingslógini. Tað kann takast við í metingina, hvussu aðrar avtalur á økinum vanliga síggja út. Er niðurstøðan, at endamálið við avtaluni er uttanumvik, er avtalan ógildig og harvið uttan rættarvirknað – ein nullitetur.

*Stk. 2* ásetir, at aðrar rættargerðir enn tær í stk. 1 nevndu, hvørs endamál er uttanumvik av reglunum í løgtingslógini, verða viðgjørdar sambært ásetingunum í §§ 4-9. Hesar rættargerðir hava tískil ikki við sær, at avtalan er ógildig sum í stk. 1. Ásetingin hevur hinvegin við sær, at reglurnar í løgtingslógini eru galdandi – eitt nú reglan um, at landsstýrismaðurin eftir umstøðunum kann geva boð um at selja.

**Til § 11**
Sambært *stk. 1, 1. pkt.* kann landsstýrismaðurin leggja sínar heimildir eftir § 2, stk. 1 og 2, § 5 og § 9, stk. 1 og 2 til ein annan myndugleika ella stovn.

Verða heimildirnar lagdar til ein stovn undir øðrum landsstýrismanni, skal hetta sambært stk. 1, 2. pkt. vera í samráð við viðkomandi landsstýrismann.

Heimildirnar, sum landsstýrismaðurin kann leggja til annan myndugleika ella stovn, eru heimildirnar at geva loyvi til at keypa fastogn og at hava nýtsluveð longur enn 6 mánaðir og heimildin at geva boð um at avhenda fastogn innan nærri ásetta freist.

Sambært *stk. 2* kann landsstýrismaðurin áseta reglur um gjald fyri umsókn at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum. Verður gjald ásett, skal tað standa mát við við virksemið og útreiðslurnar, ið standast av málsviðgerðini.

Leggur landsstýrismaðurin heimildir sínar sambært løgtingslógini til annan myndugleika ella stovn, kann landsstýrismaðurin sambært *stk. 3* áseta reglur um kærur um avgerðir, tiknar av

hesum myndugleika ella stovni, eitt nú reglur um kærufreist ella tað, at ávíst slag av avgerðum ikki kann kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Sambært *stk. 4* kann landsstýrismaðurin harafturat leggja sín kærumyndugleika til ein kærustovn, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina.

Enn er ikki viðgjørt, hvør myndugleiki skal umsita og geva loyvir sambært hesi løgtingslóg, tí eingin stovnur er undir Løgmansskrivstovuni at leggja uppgávuna til. Tí verður neyðugt at tosa við hini stjórnarráðini, um mett verður, at uppgávan skal leggjast til annan stovn ella myndugleika.

So leingi uppgávan ikki er løgd til annan stovn ella myndugleika, er tað lógartænastan á Løgmansskrivstovuni, sum umsitur loyvini.

**Til § 12**
§ 12 er revsiáseting.

Sambært *stk. 1* verður tann, sum ikki innan ásettu freistina søkir um loyvi at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum ella at yvirtaka fastogn sum nýtsluveð, revsaður við sekt. Freistirnar eru ásettar í ávikavist §§ 4 og 5.

*Stk. 2* ásetir, at brot á boð, ið eru givin sambært § 9, stk. 1 og 2, verða revsað á sama hátt, t.e. við sekt.

Ásett er harumframt, at rætturin skal áleggja eigaranum ella tí, sum hevur yvirtikið fastognina sum nýtsluveð, at akta boðini frá landsstýrismanninum/loyvismyndugleikanum. Rætturin kann í hesum sambandi áseta vikuligar tvingsilssektir, til boðini eru fylgd.

Rætturin ásetir sambært stk. 2, 3. pkt. sektarupphæddina. Tá sektarupphæddin verður ásett, skal havast í huga endamálið við sektini, ið er at eggja til, at ognin verður seld sum skjótast.

Sambært *stk. 3* koma feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

**Til § 13**
Ásett verður í *stk. 1*, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2* ásetir eina skiftisreglu. Ásett verður, at løgtingslógin er galdandi fyri øll keyp o.a., ið verður fráboðað til tinglýsingar eftir, at lógin er komin í gildi. Er keypsavtala gjørd, áðrenn løgtingslógin kemur í gildi, men ognarheimildarskjalið ikki er fráboðað til tinglýsingar, kann ognarheimildarskjalið sostatt bara tinglýsast, um keypari váttar við trú og heiður ella leggur loyvi frá landsstýrismanninum við.

Løgtingslógin er ikki galdandi fyri ognarheimildarskjal, sum er ført inn í dagbókina, men enn ikki er tinglýst, tá løgtingslógin kemur í gildi.

Løgmansskrivstovan, 7. september 2021

**Bárður á Steig Nielsen**
løgmaður

/ John Rajani

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Ummælisskjal
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Føroya Rætti
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Brúkaraumboðnum
Fylgiskjal 4: Ummæli frá MEGD
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 6: Ummæli frá BLF
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Skráseting Føroya
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Betri Heim
Fylgiskjal 11: Ummæli frá Umhvørvisstovuni
Fylgiskjal 12: Ummæli frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 13: Ummæli frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 14: Ummæli frá Kommunufelagnum